Fríggjadagur 12. desember 2008

# VARPID

Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið

Sosialurin



SvF • Leygardag 13. kl. 20.00

## »Star Wars: Episode I«

Jedimeistarin Qui-Gon Jinn og lærlingurin Obi-Wan Kenobi eru sendiharrar fyri lítlu gongustjørnuna Naboo, sum tann unga friðarelskandi Amidala er drotning yvir. Tá gongustjørnan verður kringsett av harðrendu handilssamríkjunum, flytur Jedi riddarin drotningina burtur til oyðimarkargongustjørnina Tatooine, har hon kann verða trygg, og her hitta tey skjótt unga trælin Anakin Skywalker. Amr. framtíðar/ævintýrfilmur frá 1999.



Dr2 • Leygardag 13. kl. 21.50

## »Autograf: Thomas Helmig«

Tað eru nú 25 árum liðin síðan Thomas Helmig sendi eitt demoband til plátufelagið Genlyd. Í sendingini, har hann vitjar hjá Clementi snýr tað seg ikki minst um sangskriving.



SvF • Sunnudag 14. kl. 20.00

## »Soleiðis liva tey«

Vit eru á ferð við einum 7 flokki úr Hoyvíkar Skúla, sum á vári 2007 vitjaði í Umanaq. Hesin fjarskotni grønlendski býurin liggur langt norðanfyri pólkringin. Har er lívið merkt av tætta tilknýtinum til náttúruna og føroyingarnir uppliva tann heilt serliga túrin á hundasletu tvørtur um grønlendsku ísoyðuna. Ferðin í Grønlandi ristir seg fast í minni hjá teimum ferðandi. Lagt til rættis: Zacharias Hammer.